# Frágreiðing

Altjóða búskapurin

Føroyski búskapurin

Fíggjarlógaruppskotið 2009

Fíggjarmálaráðið

Frágreiðing
Fíggjarlógaruppskotið 2009

Oktober 2008

# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI ........................................................................................................3
2. INNGANGUR ....................................................................................................4
3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN ..................................................................................5
    3.1 Støðan í altjóða búskapinum ..........................................................................5
    3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum ...........................................................7
    3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin ........................................................................10
4. FØROYSKI BÚSKAPURIN ..............................................................................11
    4.1 Gongdin í samlaða virkseminum .................................................................11
    4.2 Brúkarin ......................................................................................................14
    4.3 Tilfeingisvinnan ..........................................................................................14
    4.4 Byggivinnan .................................................................................................16
    4.5 Handilsvinnan ..............................................................................................17
    4.6 Tænastuvinnan ............................................................................................18
    4.7 Týdningarmikil lyklatøl fyri føroyska búskpin ..........................................19
    4.8 Gongdin í fíggjargeiranum ...........................................................................23
    4.9 Útlitini fyri føroyska búskapin .....................................................................24
5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2009 ..............................................................25
    5.1 Búskaparpolitikkurin 2009 ..........................................................................25
    5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2009 .....................................................26
    5.3 Gongdin í inntøkum landskassans ...............................................................27
    5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans ..............................................................27
    5.5 Framskrivingar og bundnar raðfestingar 2009 ............................................29
    5.6 Løgur 2009 ....................................................................................................31
    5.7 Gongdin í skuld og gjaldføri landskassans ..................................................32

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

# 1. FORMÆLI

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2009 eru ongar politiskar raðfestingar. Hetta fíggjarlógaruppskotið er grundað á reinar framskrivingar av verandi virksemi. Orsøkin til hetta er, at samgongan varð slitin 15. september 2008 og nýggj samgonga nústaðni er skipað, áðrenn fíggjarlógaruppskotið skuldi leggjast fram. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2009 skal sambært stýrisskipanarlógini vera lagt fram, áðrenn 1. oktober 2009.

# 2. INNGANGUR

Endamálið við hesi frágreiðingini er at skapa betri grundarlag fyri viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum.

Frágreiðingin byrjar við at lýsa gongdina í altjóða búskapinum og ymiskum viðurskiftum, ið hava týdning fyri gongdina og útlitini. Eisini er ein serlig lýsing av gongdini og útlitunum fyri norðurlendsku búskapirnar.

Næsti parturin í frágreiðingini er ein meira nágreinilig lýsing av gongdini og útlitunum í føroyska búskapinum. Gongdin og útlitini í ymiskum týdningarmiklum pørtum í føroyska búskapinum verða lýst við tí vitan og tølum, ið vóru tøk í september 2008.

Triði parturin er vanliga um fíggjarlógaruppskotið og búskaparpolitikkin í fíggjarlógaruppskotinum 2009, men politiska støðan við samgonguslitið beint áðrenn fíggjarlógaruppskotið skuldi leggjast fram, hevur við sær, at fíggjarlógaruppskotið 2009 hevur ongar politiskar raðfestingar, men byggir bert á framskrivingar og bundnar raðfestingar.

Í síðsta partinum eru nakrar talvur, ið vísa gongdina í ymsum útreiðslum  og inntøkum landskassans.

# 3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

## 3.1 Støðan í altjóða búskapinum

Stóri vøksturin í altjóða búskapinum seinastu árini er nú viknaður, serliga í USA, har vøksturin í búskaparliga virkseminum longu byrjaði at minka í 2006. Kreppan á amerikanska bústaðarmarknaðinum, ófriðaligi fíggjarmarknaðurin og vaksandi rávøruprísir hava síðan tálma vøksturin í amerikanska búskapinum enn meira. Trupulleikarnir á fíggjarmarknaðunum hava víst seg at vera álvarsligari og drúgvari enn mett varð somu tíð í fjør. Hetta er ein orsøk til at búskaparligu forsøgnirnar í Vesturevropa eru versnaðar munandi seinasta árið.

2008 hevur verið merkt av vaksandi inflasjón í so at siga øllum londum. Í USA er brúkaraprístalið hækkað til umleið 4% og í evruøkinum til umleið 3%. Í Kina er inflasjónin vaksin úr 2,25% upp í 8% seinastu tvey árini.

Tað er stóri vøksturin í olju- og matvøruprísunum, sum er fremsta orsøkin til inflasjónsvøksturin. Vaksandi rávøruprísir stimbra inflasjónsvøksturin, meðan altjóðagerðin tálmar inflasjónsvøksturin, tí framleiðsla verður flutt til lond við lágum framleiðslukostnaði. Í seinastuni hava vaksandi rávøruprísir havt størri ávirkan á inflasjónsgongdina enn altjóðagerðin.

Høgi oljuprísurin kemst av stórum eftirspurningi og avmarkingum í framleiðsluni, sum ikki svarar til eftirspurningin. Lond uttan fyri OECD standa fyri 80% av vøkstrinum í oljunýtsluni seinastu árini. Av hesum umboðar Kina ein triðing av vøkstrinum. Í nógvum av hesum londunum eru tað ikki marknaðarkreftirnar, ið avgerða orkuprísirnar. Orkunýtsla verður stuðla fíggjarliga og tí hækkar bæði eftirspurningur og oljuprísur á heimsmarknaðinum.

Í fleiri menningarlondum er politisk avgerð tikin um, at brúkarar og vinna ikki skulu merkja oljuprísvøksturin á heimsmarknaðinum. Hetta verður gjørt við at lækka avgjøld og hækka stuðulin til oljunýtslu, men tá tað ikki er møguligt at økja útboðið av olju á heimsmarknaðinum, verður endaliga úrslitið av øktu olju-

nýtsluni, at prísvøktsurin á olju á heimsmarknaðinum verður størri enn oljustuðulin. Tað verður tí ikki brúkarin, men oljuframleiðarin, sum fær endaliga vinningin, tá oljunýtslan verður stuðla fíggjarliga uttan at oljuútboðið á heimsmarknaðinum kann økjast. Tá tað ikki er møguligt at økja oljuútboðið ella at fáa orku frá øðrum orkukeldum yvir styttri tíð, hevur tað týdning, at brúkarin merkir prísvøksturin á olju á altjóða marknaðinum, um útboðið skal tillagast eftirspurninginum.

Umframt vaksandi eftirspurningin er spekulasjón eisini ein orsøk til høga oljuprísin. Tá niðurgongdin byrjaði á partabrævamarknaðunum løgdu spekulantar seg eftir at spekulera í rávøruprísum. Hetta fekk prísin á rávørum, serliga olju og matvørum, at økjast enn meira. Hesin parturin av prísvøkstrinum kann broytast rættiliga skjótt.

Ófriðurin á fíggjarmarknaðunum og stóri altjóða vøksturin í inflasjónini hevur við sær, at stór óvissa er í metingunum um framtíðar vøksturin í aljtóða búskapinum. Hetta sæst millum annað aftur í metingunum um vøksturin í amerikanska búskapinum fyri 2008 og 2009. Fyri 2009 liggja hesar frá 0,6 til 3,6%.

Amerikanarar slakaðu munandi í fíggjar- og pengapolitikkinum eftir at afturgongdin í amerikanska búskapinum varð staðfest. Síðan august 2007 er pengapolitiska stýringsrentan í USA lækkað 3,25 prosentstig og er nú 2%. Amerikanarar hava lækkað rentuna sjálvt um inflasjónin er høg. Vandi er tí fyri, at høga inflasjónin fer at verða varandi. Vandin er serliga stórur í asiatisku londunum, har inflasjónin er hægri enn í USA. Hesi londini reka fastkurspolitikk mótvegis dollaranum og mugu tí fylgja amerikanska rentupolitikkinum.

Búskapurin í evruøkinum er bæði sunnur og sterkur. Tað er serliga almenni búskapurin í evroøkinum, sum er væl fyri. Mett verður tó, at vøksturin í búskapinum fer at verða væl minni komandi tíðina. Hetta kemst av hækkandi rávøruprísum, fallandi prísum á bústaðarmarknaðunum og afturgongdini í amerikanska búskapinum. Vøksturin í virkseminum er minkandi og arbeiðsloysið er

vaksandi. BTÚ-vøksturin í evruøkinum liggur um 1,5%. Evropeiski miðbankin (ECB) hevur ikki broytt pengapolitisku rentuna síðan juni 2007.

Kina, India og onnur menningarlond hava higartil ikki verið so nógv ávirkað av kreppuni á fíggjarmarknaðunum. Hóast bæði framleiðsla og útflutningur er eitt sindur minkað, so er búskaparligi vøksturin framvegis stórur í hesum londum. Vøksturin er annars stórur í rávøruframleiðandi londum, har vøksturin í rávøruprísunum økir um útflutningsinntøkurnar og keypiorkuna.

## 3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum

Gongdin í altjóða búskapinum ávirkar norðurlendsku búskapirnir við lægri vøkstri og hægri inflasjón, sum er drivin av hægri olju- og rávøruprísum.

Hóast ófriðin á fíggjarmarknaðunum eru **íslendsku** íløgurnar, privata nýtslan og útflutningurin øktur meira í 2007 enn væntað varð frammanundan. Aluminiums- og fiskivinnan eru framvegis týdningarmestu vinnurnar í Íslandi, men bygnaðurin í íslendska búskapinum er seinastu árini broyttur, soleiðis at fíggjargeirin nú hevur fingið lutfalsliga størri týdning. Innlánini í trimum teimum størstu íslendsku bankunum (Glitnir, Kaupting og Landsbankanum) eru nú tríggjar ferðir størri enn íslendska bruttotjóðarúrtøkan. Stóri vøksturin hjá bankunum hongur saman við færri avmarkingum og størri opinleika og gjøgnumskygni á fíggjarmarknaðunum.

Fíggjarkreppan í USA hevur havt neiliga ávirkan á íslendska búskapin. Íslendski búskapurin er lítil og sera viðbrekin fyri altjóða spekulasjón og leysatíðindum um gongdina í íslendska fíggjarheiminum. Óstøðuga íslendska krónan og rentan hava havt við sær, at íslendskir politikarar umhugsa at fara inn í Evrusamstarvið. Íslendska stjórnin hevur veitt trygd fyri, at hon kann bjarga íslendska fíggjar-kervinum um tað gerst neyðugt. Íslendski miðbankin hevur gjørt valuta avtalu við miðbankarnar í Danmørk, Noreg og Svøríki. Altingið hevur eisini góðkent, at stjórnin kann læna upp til 500 mió. evrur um kreppan í íslendska fíggjarheiminum gerst álvarslig. Annars verður mett, at eftirspurningurin og virksemi í Íslandi fer at minka. Í ár verður BTÚ-vøksturin væntandi 0,5%.

**Finski** búskapurin er framvegis sterkur, men vøksturin er minni nú enn hann hevur verið. Í ár verður BTÚ-vøksturin væntandi 2,8% samanborið við 4,4% í 2007. Orsøkin til minkingina er afturgongdin í altjóða búskapinum og minni framleiðsla í skógarídnaðinum. Tollavmarkingar hava eisini minka um útlflutningin til Russland. Privata nýtslan er framvegis stór og arbeiðsloysið er minkað niður í 6,2%. Í apríl í ár var inflasjónin 3,5%, men hon fer væntandi at minka av afturgongdini á bústaðarmarknaðinum. Lønarsáttmálarnir á finska arbeiðsmarknaðinum kosta millum 9,5 og 13,1% frá 2007 til 2009. Stóri lønarvøksturin saman við altjóða lágkonjunkturi kann skaða finska kappingarføri. Í Finnlandi verður í løtuni rikin ekspansivur fíggjarpolitikkur, hvørs endamál er at økja um virksemi og minka arbeiðsloysið. Hetta verður gjørt við m.a. at lækka inntøkuskattin. Ein arbeiðsbólkur er settur at kanna møguleikarnar fyri skattalættum.

**Áland** fær part av finsku skattainntøkunum umvegis eina avrokningarskipan millum Finnland og Áland. Búskaparliga gongdin í Álandi er tí nær tengd at gongdini í finska búskapinum. Búskapurin í Álandi er sterkur. Farmasigling er framvegis størsta vinnugreinin í Álandi, men tænastuvinnan hevur fingið størri týdning, tí stórur vøkstur hevur verið í kt-, banka- og tryggingarvinnuni. Afturgongdin í altjóða búskapinum við hægri inflasjón og hægri rentu hevur tálmað virksemi í álendsku byggivinnuni.

Búskaparvøksturin fer væntandi at minka meira í **Danmark** enn í hinum norðanlondunum. Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er tó framvegis stórur og arbeiðsloysið er metlágt. Afturgongdin í altjóða búskapinum kemur ikki so illa við í Danmørk, tí danski búskapurin hevur verið í vanda fyri yvirupphiting. Danmark hevur vinning av høga oljuprísinum, tí Danmark er nettoútflytari av olju. Afturgongd hevur verið á bústaðarmarknaðinum, men tað er stórur munur á prísgongdini í høvuðsstaðnum og í restini av landinum. Í 2006 var stórur prísvøkstur á bústaðarmarknaðinum, meðan prísirnir fullu 20% í 2007. Talan er ikki um eina djúpa kreppu á bústaðarmarknaðinum, men heldur um eina tillaging av prísstøðinum. Fíggjarkreppan í USA hevur ikki havt stóra ávirkan á danska fíggjar-

geiran. Ætlanin er at reka neutralan fíggjarpolitikk í 2008 og 2009, men útreiðslutrýstið er stórt, bæði hjá stati og kommunum. Seinastu árini er danska kappingarføri versnað, tí lønarvøksturin hevur verið størri enn produktivitetsvøksturin. Danska stjórnin metir, at arbeiðsmegin er ov lítil og hevur tí sett tveir bólkar, ein arbeiðsmarknaðarbólk og ein skattabólk, sum skulu finna fram til, hvussu útboðið av arbeiðsmegi í Danmark kann gerast størri.

Eftir lágkonjunktur frá 2001 til 2003, hevur framgongd aftur verið í **grønlendska** búskapinum frá 2004 til 2006. BTÚ-vøksturin var umleið 2% í 2007 samanborið við 2,6% í 2006. Grønlendska arbeiðsloysið er minkað við 452 persónum síðan 2003. Í 2005 vóru 2.600 arbeiðsleys í Grønlandi. Høgi oljuprísurin hevur økt nógv um framleiðslukostnaðin í grønlendsku fiskivinnuni. Høgi oljuprísurin noyðir eisini grønlendarar at kanna møguleikarnar fyri at útbyggja vatnorkuna. Nógvar kanningar og royndarboringar verða gjørdar eftir mineralum og olju í grønlendsku undirgrundini. Mett verður, at góðir møguleikar eru fyri at útvinna zink og blýggj úr grønlendsku undirgrundini. Avtala er gjørd um stórar íløgur at byggja eitt aluminiumsverk, sum verður drivið av vatnorku. Stóru íløgurnar í vatnorku, betri pensjónsskipan umframt aðrar íløgur í grønlendska samfelagnum, hava við sær, at grønlendska fíggjarlógin fer at hava stórt hall í 2008 og 2009.

Í **Noreg** er búskaparvøksturin framvegis stórur. Seinastu 4 árini hevur árligi vøksturin ligið um 5%. Í ár verður vøksturin mettur til 3,25%. Innflutningur av arbeiðsmegi og vaksandi produktivitetur hava verið grundarlagið undir stóra búskaparvørkstrinum í Noreg øll hesi árini. Arbeiðsmegin er økt við 250.000 persónum síðan 2003 og arbeiðsloysið á 2,4% er tað lægsta í 20 ár. Virksemið í norska búskapinum er nú minkandi, men hetta verður mett at vera neyðugt, um sleppast skal undan yvirupphiting av norska búskapinum. Oljuíløgurnar í Noreg eru framvegis stórar og hava stóra ávirkan á norska búskapin. Vaksandi rávøruprísirnir hava tí skapt stórar inntøkur í norska búskapinum. Mett verður, at ferðin á bústaðarmarknaðinum og í byggivinnuni fer at minka í ár. Tað er tó framvegis møguleiki fyri, at norski miðbankin fer at hækka rentuna.

Í **Svøríki** verður mett, at búskaparvøksturin minkar niður í 2% í ár og niður um 2% í 2009. Sviar reka ein varnan fíggjarpolitikk og halda vakið eygað við lágkonjunkturinum. Almenni búskapurin í Svøríki er sterkur, tí seinastu árini hevur inntøkuvøksturin verið væl størri enn útreiðsluvøksturin. Hetta gevur góðan møguleika fyri at reka ekspansivan fíggjarpolitikk, nú svenski búskapurin er á veg inn í ein lágkonjunktur. Tiltøkini at minka arbeiðsloysið og sjúkrafráveruna hava givið góð úrslit. Skattalættar til lág- og miðalinntøkurnar hava givið betri úrslit enn mett varð frammanundan. Svenska stjórnin hevur ætlanir um at fremja fleiri skattalættar. Stóri vøksturin í orku- og rávøruprísunum skaptu stóran inflasjóns-vøkstur í endanum av 2007 og í 2008. Svøríki hevur eisini fyrimunir av vaksandi rávøruprísunum, tí hetta økir um útflutningsinntøkurnar av jarni og stáli. Hetta er orsøkin til at størsti vøksturin í Svøríki hevur verið í stál- og jarnídnaðinum í norðara partinum av landinum. Samanumtikið minka svensku konjunkturarnir, inflasjónstrýstið økist, samstundis sum almenni búskapurin er sterkur og sunnur.

## 3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin

Seinasta árið hevur altjóða búskapurin verið merktur av skjótt vaksandi olju- og rávøruprísum, serliga matvøruprísum. Samstundis sum vaksandi rávøruprísirnir hava skapt vaksandi inflasjón eru bústaðarprísirnir og kursirnir á partabrøvum og øðrum virðisbrøvum falnir munandi. Hetta hevur skapt eina umfatandi fíggjar-kreppu kring allan heimin.

Altjóða búskapurin er tí komin inn í ein lágkonjunktur, har stór óvissa er um búskaparligu gongdina í nærmastu framtíð. Stóra óvissan stavar frá ófriðinum í fíggjarheiminum kring allan heim í løtuni.

# 4. FØROYSKI BÚSKAPURIN

## 4.1 Gongdin í samlaða virkseminum

**Talva 4.1: Samlaðar lønargjaldingar fyrra hálvár frá 2003 til 2008.**

| *1.000 kr.* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 2.597 | 3.270 | 3.408 | 3.780 | 5.501 | 6.448 |
| Fiskiskapur | 417.514 | 403.270 | 376.556 | 431.564 | 492.926 | 369.035 |
| Ali- og kryvjivirki | 65.321 | 47.780 | 33.859 | 38.021 | 52.587 | 68.511 |
| Ráevnisvinna | 8.891 | 9.027 | 10.286 | 11.550 | 12.108 | 16.498 |
| Fiskavøruídnaður | 180.836 | 197.710 | 185.474 | 180.310 | 173.951 | 169.406 |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 64.681 | 62.115 | 64.480 | 68.136 | 78.951 | 81.590 |
| Ídnaður annars | 104.190 | 110.396 | 107.502 | 111.163 | 117.886 | 126.057 |
| Bygging | 155.840 | 175.968 | 175.527 | 200.730 | 228.537 | 255.190 |
| Orkuveiting | 22.800 | 27.114 | 24.068 | 24.390 | 25.730 | 27.392 |
| Handil og umvæling | 278.799 | 292.187 | 286.654 | 302.114 | 329.279 | 348.707 |
| Gistihús og matstovur | 31.103 | 32.721 | 32.671 | 35.158 | 38.671 | 41.862 |
| Sjóflutningur | 100.884 | 102.256 | 106.908 | 114.635 | 121.757 | 141.627 |
| Flutningur annars | 62.943 | 68.253 | 71.872 | 81.430 | 99.069 | 113.077 |
| Postur og fjarskifti | 80.937 | 82.898 | 82.237 | 82.020 | 87.411 | 88.885 |
| Fígging og trygging | 110.318 | 116.920 | 120.651 | 143.542 | 164.344 | 187.798 |
| Vinnuligar tænastur | 85.445 | 93.955 | 98.947 | 111.458 | 124.564 | 143.248 |
| Húshaldstænastur | 17.045 | 18.746 | 20.487 | 21.846 | 23.987 | 28.134 |
| Almennanr tænastur | 905.501 | 987.808 | 1.058.262 | 1.062.226 | 1.133.753 | 1.211.246 |
| Felagsskapir og mentan | 89.480 | 58.877 | 60.682 | 66.397 | 68.095 | 70.983 |
| Ótilskilað vinna | 183 | 1.191 | 1.976 | 2.147 | 743 | 251 |
| **Tilsamans** | **2.785.306** | **2.892.463** | **2.922.507** | **3.092.616** | **3.379.847** | **3.495.943** |

**Mynd 4.1:** Lønargjaldingar tilsamans



Stórur vøkstur hevur verið í búskaparliga virkseminum í Føroyum síðan ártúsundskifti, sí mynd 1 og talvu 1. Hálvárligi miðalvøksturin í lønargjaldingunum hevur verið 5,65% frá fyrra hálvár 2000 til til fyrra hálvár 2008. Vøksturin var størstur frá 2000 til 2002, tá hálvárligi miðalvøksurin í lønargjaldingunum var 10,6%. Frá 2002 til 2005 minkaði hálvárligi miðalvøksturin niður í 2%. Síðan veksur hálvárligi miðalvøksurin upp í 7,5% frá 2005 til 2007, men er nú minkaður aftur niður í 3,4%.

At virksemið minkar sæst aftur í føroyska konjunkturbarometrinum[1]. Føroyska konjunkturbarometrið vísir, at føroyski búskapurin kølnar. Samlaða treystitalið er lækkað munandi seinastu tíðina, sí mynd 4.2.




Samlaða treystitalið hjá brúkarum og vinnu er lækkað úr 24 niður í -5 frá januar til juni 2008. Hetta svarar til 29 stig. Samlaða treystitalið er býtt sundur í brúkarar og fýra vinnubólkar. Úrslitini av hvørjum einstøkum spurningi í konjunkturbarometrinum eru at síggja á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum www.fmr.fo. Treystitølini verða í stuttum lýst á næstu síðunum.

[1] Í føroyska konjunkturbarometrinum verða føroyskir brúkarir og føroysk vinna spurd, hvussu tey meta gongdina í føroyska búskapinum seinasta árið, støðuna í løtuni og hvussu tey meta gongdina komandi 12 mánaðirnar, sí faktaboksina á síðu 14.

**Fakta um konjunkturbarometrið**
Konjunkturbarometrið er eitt vísital, sum sigur nakað um, hvussu brúkarar og vinna meta, at tíðirnar eru. Barometrið er sostatt ikki ein uppgerð av veruligum tølum úr búskapinum, men ein kvalitativ spurnarkanning av, hvørja meting lyklabólkar í samfelagnum gera sær av gongdini í búskapinum, bæði gongdini júst nú og eisini hvørjar vánir, bólkarnir síggja í framtíðini.

Spurnarkanningarnar verða gjørdar hálva hvørt ár, í januar og í juni. Úrslitini verða kunngjørd 15. februar og 15. juli. Tað er Gallup-Føroyar, sum stendur fyri spurnarkanningunum. Kanningarnar verða gjørdar soleiðis, at Gallup ringir til 500-600 tilvildarliga vald húski og spyr tey 15 spurningar um peningarlig viðurskifti og teirra meting av búskapargongdini í Føroyum. Í vinnuni eru 100 virkir vald út og vektað eftir starvsfólkatalinum, soleiðis at øll vinnan er umboðað. Vinnan er býtt upp í fýra høvuðsbólkar og svarar spurnarbløðum við millum 5 og 15 spurningum. Vinnuvirkini nýtast ikki at vera akkurát tey somu til hvørja kanning, tí virkir kunnu halda upp at við sínum virksemi, men tá verða nýggj virkir sett ístaðin, soleiðis at øll vinnan altíð er umboðað.

Niðanfyri er víst, hvussu nógvar spurningar brúkarar og vinnubólkarnir fáa og hvussu hesi eru vektaði í samlaða treystitalinum fyri brúkarar og vinnu tilsamans:

- Brúkarar fáa 15 spurningar og vekta 20% í samlaða konjunkturbarometrinum
- Tilfeingisvinnan fær 15 spurningar og vektar 40% í samlaða barometrinum
- Tænastuvinnan fær 5 spurningar og vektar 30% í samlaða konjunkturbarometrinum
- Handilsvinnan fær 5 spurningar og vektar 5% í samlaða konjunkturbarometrinum
- Byggivinnan fær 6 spurningar og vektar 5% í samlaða konjunkturbarometrinum

Spurningarnir eru ymiskir fyri hvønn bólkin, og svarmøguleikarnir somuleiðis. Spurningarnir eru teir somu, sum verða brúktir í øllum tríati londunum, ið luttaka í ECFIN-samstarvinum, og mátin, ið nýttur verður at gera kanningarnar upp, er eisini tann sami.

Vinnan hevur tríggjar svarmøguleikar og brúkarin hevur 5 og 6 svarmøguleikar til hvønn spurning. Vinnnan kann svara játtandi, sýtandi ella neutralt til hvønn einstakan spurning. Brúkarin kann svara avgjørt játtandi ella sýtandi, minni játtandi ella sýtandi, neutralt ella veit ikki. Neutralu svarúrslitini og veit ikki verða soldaði frá. Hjá vinnuni verða játtandi svarini faldað við 1 og sýtandi svarini við -1. Hjá brúkarunum verða avgjørdu svarini falda við 1 og -1 og minni avgjørdu svarini við ½ og -½. Nettotalið til hvønn einstakan spurning verður so eitt tal, sum liggur einastaðni millum minus 100 og pluss 100.

Niðanfyri eru tvey dømi:

| Spurningur 2 til tænastuvinnuna: | **Eftirspurningur í seinastuni** | **50** |
|---|---|---|
| | -vaksandi | 52 |
| | -Óbroyttur | 46 |
| | -Minkandi | 2 |

Nettotalið fyri spurningin er 50. Tað merkir, at 50 prosentstig fleiri (52-2) svaraðu játtandi enn sýtandi. Tey, sum svaraðu, at eftirspurningurin hevur verið óbroyttur, verða soldaði frá.

| Spurningur 1 til brúkaran: | **Fíggjarstøða seinasta árið** | **-8** |
|---|---|---|
| | -Nógv betur | 3 |
| | -Nakað betur | 16 |
| | -Óbroytt | 49 |
| | | |
| | -Nakað verri | 25 |
| | -Nógv verri | 6 |
| | -Veit ikki | 1 |

## 4.2 Brúkarin

Føroyski brúkarin hevur eina heldur neiliga meting av búskaparligu gongdini seinasta árið og útlitunum fyri føroyska búskapin komandi árið, sí mynd 4.3. Treystitalið hjá føroysku brúkarunum er lækkað úr -2 niður í -29 frá januar til juni 2008. Hetta svarar til 27 stig.




Fíggjarstøðan hjá føroysku brúkarunum er versnað seinasta árið og brúkarin væntar at fíggjarstøðan fer at halda fram við at versna. At føroyski brúkarin ikki er so bjartskygdur nú sum hann hevur verið, sæst aftur í nýtsluatferðini. Sum heild minkar eftirspurningurin eftir dýrum vørum. Brúkarin metir ikki, at tað verða stórvegis prísbroytingar, men føroyski brúkarin metir, at arbeiðsloysið fer at vaksa.

## 4.3 Tilfeingisvinnan

Hálvárligi miðalvøksturin fyri fyrra hálvár í lønargjaldingunum í tilfeingisvinnuni hevur verið 1,46% frá 2000 til 2008, men tað hava verið rættiliga stór sveiggj í lønargjaldingunum hetta tíðarskeiðið. Frá 2000 til 2002 var miðalvøksturin 11,8%, frá 2002 til 2005 var miðalvøksturin -5,7%, frá 2005 til 2007 er miðalvøksturin 9,3% og seinasta hálvárið hevur vøksturin aftur verið negativur, -10,3%, samanborið við somu tíð í fjør, sí mynd 4.4.




Konjunkturbarometrið hjá tilfeingisvinnuni er nógv fallið síðan 2007, sí mynd 4.5. Treystitalið er fallið úr 33 niður í -8, svarandi til 41 stig, frá januar 2007 til juni 2008.




Framgongdin í framleiðsluni og vøksturin í eftirspurninginum í tilfeingisvinnuni er nógv minkað seinasta árið og er framvegis minkandi. Framleiðsluorkan tillagar seg fallandi virksemi og stóri tørvurin á arbeiðsmegi er tí nógv minkaður. Tað er ikki longur manglandi arbeiðsmegi, men fíggjarligar avmarkingar, sum eru mest

avmarkandi fyri framleiðsluna í tilfeingisvinnuni. Tilfeingisvinnan væntar tó betri prísir og fleiri bíleggingar úr útlondonum komandi árið.

## 4.4 Byggivinnan

Í byggivinnuni hevur hálvárligi miðalvøksturin í lønargjaldingunum verið 9,7% frá 2000 til 2008. Miðalvøksturin var serliga stórur frá 2005 til 2008, tá hann var 13,3%, samanborið við 7,6% frá 2000 til 2005, sí mynd 4.6.

**Mynd 4.6:** Lønargjaldingar í byggivinnuni




Stóra yvirupphitingin í byggivinnuni er við at kølna. Hetta sæst aftur í stórum fallið í konjunkturbarometrinum seinasta árið, sí mynd 4.7. Treystitalið er fallið úr 91 niður í -22 frá januar 2007 til juni 2008, svarandi til 113 stig.

Eftirspurningurin og bíleggingarnar í byggivinnuni eru minkandi, men byggivinnan hevur framvegis fullur bíleggingarbøkur, tí sæst niðurkølingin í byggivinnuni ikki rættiliga enn og arbeiðstørvurin er framvegis stórur. Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi í byggivinnuni fer sum frá líður at minka, samstundis sum prísurin fyri byggiverkætlanir fer at minka.




## 4.5 Handilsvinnan

Hálvárligi miðalvøksturin í lønargjaldingunum í handilsvinnuni hevur verið 6,2% frá 2000 til 2008, sí mynd 4.8.




Trýstið er eisini fallið á barometrinum hjá handilsvinnuni, sí mynd 4.9. Handilsvinnan væntar, at søla, bíleggingar og tørvurin á arbeiðsmegi fara at minka komandi árið.




## 4.6 Tænastuvinnan

Hálvárligi lønarvøksturin í tænastuvinnuni hevur verið 7,3% frá 2000 til 2008. Privata tænastuvinnan er vaksin við 8,1% og almenna tænastuvinnan er vaksin við 6,8% um hálvárið, sí mynd 4.10.




Mynd 4.10 vísir, at vøkstur hevur verið í almennu lønargjaldingunum frá 2002 til 2005 meðan stígur ella afturgongd var í lønargjaldingunum í øllum privatu vinnunum. Tá vøkstur kom í aftur privata virksemið í 2006, var ikki so stórur vøkstur í almennu lønargjaldingunum. Henda gongdin hevur minkað um sveiggini í føroyska búskapinum hetta tíðarskeiðið.

Tænastuvinnan væntar, at eftirspurningurin og tørvurin á arbeiðsmegi fer at minka komandi árið. Hetta sæst aftur í konjunkturbarometrinum hjá tænastuvinnuni, sum er nógv fallið í seinastuni, sí mynd 11.




## 4.7 Týdningarmikil lyklatøl fyri føroyska búskpin

Hóast konjunkturbarometrið fellur og myrk skýggj hómast í havsbrúnni, so er framvegis stórt virksemið í føroyska búskapinum. Arbeiðsloysið hevur verið metlágt í summar og í august var árstíðarjavnaða arbeiðsloysið 1,3%, sí mynd 4.12.



Brúkaraprístalið var omanfyri 7% hægri í 2. ársfjórðingi 2008 samanborið við sama ársfjórðing 2007, sí mynd 4.13. Tað er serliga vøksturin í olju- og matvøruprísunum, sum hála brúkaraprístalið uppeftir, men prísvøksturin sæst nú aftur í so at siga øllum vørubólkum. Vaksandi oljuprísurin hevur stóra ávirkan á føroyska samfelagsbúskapin, tí føroyska samfelagið er sera bundið av oljuni sum orkukeldu. Seinastu tíðina hevur oljuprísurin verið fallandi, sí mynd 4.14.









Stórur vøkstur hevur verið í sethúsaprísunum, serliga í høvuðsstaðnum, sí mynd 4.15. Tað hevur tó verið eitt lítið fall aftur í sethúsaprísunum í 2. ársfjórðingi í 2008 samanborið við somu tíð í 2007. Miðalprísurin var í 2. ársfjórðingi í ár 2.250.000 kr. í Tórshavn, 1.032.500 kr. í størru bygdunum og 1.083.640 kr. í smærru bygdunum.

Stóri nýtsluvøksturin í Føroyum hongur neyvt saman við stóra útlánsvøkstrinum í føroysku peningastovnunum í 2006 og 2007, sí mynd 4.16.



Føroyska útflutningsvirðið hevur sveiggja um 2 mia. kr. fyrra hálvár síðan 2000, sí mynd 4.17. Nógv størri sveiggj hevur verið í útflutningsnøgdini. Fyrra hálvár 2008 var rættiliga stórt fall í útflutningsnøgdini samanborið við somu tíð í 2007. Fallið í útflutningsvirðinum var væl minni hesa tíðina, sí mynd 4.17.




Vøkstur var í innflutninginum uttan skip, flogfør o.t. fram til 2002, tá innflutningurin fór at minka til 2005, tá innflutningurin aftur tók rættiliga dyk á seg, sí mynd 4.18.




Handilsjavnin er minkaður síða 2001, sí mynd 4.19. Í 2005 vendi handilsjavnaavlopið til hall, sum hevur verið vaksandi síðani tá.




## 4.8 Gongdin í fíggjargeiranum

Samlaða úrslitið áðrenn skatt hjá føroysku peningastovnunum var 652 mió. kr. í 2007, sí talvu 4.2. Hetta er næstan 30% størri enn í 2006, sum eisini var metár. Stórur partur av úrslitinum í 2007 stavar frá kursvinningum, men vøksturin í virkseminum sæst eisini aftur á útreiðslusíðuni, sum vaks við 30%.

**Talva 4.2: Úrslitið hjá føroysku peningastovnunum frá 2003 til 2007.**

| *Mió. kr.* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur og ómaksgjøld | 574 | 553 | 550 | 632 | 830 |
| Kursreguleringar o.t. | 43 | 95 | 47 | 49 | 181 |
| Úrslit av fíggjarligum postum | 617 | 648 | 597 | 682 | 1.011 |
| Rakstrarútreiðslur | 281 | 290 | 313 | 371 | 483 |
| Avskrivingar og burturleggingar, netto | 437 | 119 | -15 | -74 | 25 |
| Úrslit frá dótturfeløgum | 1 | 13 | 41 | 123 | 149 |
| Úrslit áðrenn skatt | -100 | 252 | 341 | 507 | 652 |
| | | | | | |
| Solvensprosent | 30,9 | 31,4 | 20,6 | 18,4 | 18,8 |

Samlaða úrslitið hjá føroysku peningastovnunum fyrra hálvár í ár var næstan null. Hetta stavar fyri stóran part frá stórum negativum kursreguleringum. Stóri vøksturin í útlánunum steðgaði fyrra hálvár 2008. Innlánsvøksturin hevur tó verið munandi minni enn útlánsvøksturin, og føroysku bankarnir eru tí vorðnir meira bundnir av fígging frá pengamarknaðinum.

## 4.9 Útlitini fyri føroyska búskapin

Hákonjunktururin, sum hevur verið í føroyska búskapinum í 2006 og 2007 er um at hasa av, men enn merkist hetta ikki serliga væl, tí føroyska arbeiðsloysið er framvegis sera lágt. Higartil sæst fallið í búskaparvøkstrinum m.a. aftur í minkandi innflutningi og minkandi útlánsvøkstri hjá peningastovnunum.

Hóast innflutningurin minkar, so eru framvegis útlit fyri stórum hallið á handilsjavnanum, tí útflutningsvirðið er eisini minkandi. Føroyingar eiga stóra nettoáogn uttanlands, men eitt hall á handilsjavnanum í fleiri ár frameftir fer at venda áognini uttanlands til nettoskuld.

Skjótt vaksandi oljuprísurin hevur verið rættiliga tyngjandi fyri føroyska fiskiskapin, men vánaliga støðan hjá toska- og hýsustovnunum ávirka eisini føroysku fiskivinnuna skeiva vegin. Harafturímóti gongur framá hjá alivinnuni í hesum døgum.

# 5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2009

## 5.1 Búskaparpolitikkurin 2009

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2009 eru ongar politiskar raðfestingar. Hetta fíggjarlógaruppskotið er grundað á reinar framskrivingar av verandi virksemi. Orsøkin til hetta er, at samgongan varð slitin 15. september 2008 og nýggj samgonga nústaðni er skipað, áðrenn fíggjarlógaruppskotið skuldi leggjast fram. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2009 skal sambært stýrisskipanarlógini vera lagt fram, áðrenn 1. oktober 2009.

Framskrivingarfortreytirnar eru hesar:

**Rakstrarjáttanir**
Lønarframskriving 3%
Annar rakstur 0%

Framskrivað verður fyri virksemi, sum endar ella minkar í 2008. Somuleiðis verður framskrivað fyri fult ár fyri virksemi, sum er sett í gongd í 2008.

**Landsfyritøkur**
Eingin framskriving, tí inntøkurnar kunnu hækkast samsvarandi.

**Løgujáttanir**
Sáttmálabundið virksemi og framhald av verandi verkætlanum verður tikið við.

**Lógarbundnar játtanir**
Framskrivað verður fyri virksemi sambært galdandi lóggávu.

**Aðrar játtanir**
Eingin framskriving.

## 5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2009

RLÚ-avlop landskassans verður -244,4 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2009, sí mynd 5.1. Hetta er munandi verri enn úrslitið í ár, sum verður mett til -17 mió. kr. Tølini fyri 2008 eru fyribils metingar, sum eru fíggjarlógartøl fyri 2008 saman við veittum eykajáttanum og metingar av umbidnum eykajáttanum higartil í ár.




Talva 5.1 vísír vøksturin í inntøkum og útreiðslum landskassans frá 2003 til 2009.

**Talva 5.1: Vøkstur í inntøkum og útreiðslum landskassans, 2003-2009**

| *Vøkstur í %* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | -0,9 | -2,7 | 1,6 | 12,8 | 5,3 | 3,4 | -0,6 |
| Útreiðslur | 3,9 | 2,2 | 3,2 | 2,7 | 5,4 | 7,5 | 4,7 |

Viðm: Tølini fyri 2008 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2009 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.3 Gongdin í inntøkum landskassans

Talvur 5.2 og 5.3 vísa gongdina í inntøkum landskassans frá 2003 til 2009.

**Talva 5.2: Inntøkur landskassans, 2003-2009**

| *Mió. kr.* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.581 | 1.539 | 1.508 | 1.680 | 1.791 | 1.823 | 1.883 |
| Avgjaldsinntøkur | 1.274 | 1.259 | 1.322 | 1.547 | 1.722 | 1.835 | 1.754 |
| Ymsar inntøkur | 81 | 41 | 67 | 120 | 45 | 40 | 35 |
| Heildarveiting o.t. | 632 | 633 | 631 | 632 | 632 | 632 | 635 |
| **Tilsamans** | **3.568** | **3.472** | **3.528** | **3.979** | **4.191** | **4.332** | **4.308** |

Viðm: Tølini fyri 2008 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2009 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

**Talva 5.3: Vøkstur í inntøkum landskassans, 2003-2009**

| *Vøkstur í %* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | -5,4 | -2,7 | -2,0 | 11,4 | 6,6 | 1,8 | 3,3 |
| Avgjaldsinntøkur | 2,8 | -1,2 | 5,0 | 17,0 | 11,3 | 6,6 | -4,4 |

## 5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans

Talvur 5.4 og 5.5 vísa gongdina í útreiðslum landskassans frá 2003 til 2009.

**Talva 5.4: Útreiðslur landskassans, 2003-2009**

| *Mió. kr. (netto)* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 3.192 | 3.324 | 3.467 | 3.578 | 3.767 | 4.133 | 4.419 |
| Løguútreiðslur | 262 | 228 | 201 | 268 | 292 | 234 | 145 |
| Rentuútreiðslur | 91 | 72 | 71 | -7 | -14 | -19 | -12 |
| **Tilsamans** | **3.545** | **3.624** | **3.739** | **3.839** | **4.045** | **4.348** | **4.552** |

Viðm: Tølini fyri 2008 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2009 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

**Talva 5.5: Vøkstur í útreiðslum landskassans, 2003-2009**

| *Vøkstur í %* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 1,4 | 4,1 | 4,3 | 3,2 | 5,3 | 9,7 | 6,9 |

Talva 5.6 vísir gongdina í nettorakstrarútreiðslum landskassans býttar á málsøkið frá 2005 til 2006.

**Talva 5.6: Nettorakstrarútreiðslur landskassans, 2005-2009**

| *Mió. kr.* | | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 35,2 | 34,6 | 37,1 | 44,7 | 45,9 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 35,8 | 35,2 | 39,4 | 18,0 | 18,1 |
| § 3 | Fíggjarmál | 208,2 | 232,8 | 281,0 | 371,7 | 429,8 |
| § 5 | Fiski- og tilfeingismál | 167,2 | 193,4 | 162,6 | 217,3 | 227,4 |
| § 6 | Vinnumál | 287,4 | 263,8 | 242,1 | 256,9 | 378,8 |
| § 7 | Mentamál | 717,5 | 747,7 | 785,4 | 824,8 | 887,4 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 1.906,4 | 1.944,0 | 2.059,9 | 2.184,7 | 2.313,6 |
| § 14 | Løgmál | 109,3 | 126,7 | 159,5 | 184,9 | 185,0 |
| § 16 | Uttanríkismál | | | | 30,2 | 33,0 |
| **Tilsamans** | | **3.467,1** | **3.578,2** | **3.767,0** | **4.133,2** | **4.519,0** |

Viðm: Tølini fyri 2008 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2009 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Talva 5.7 vísir gongdina í nettoløguútreiðslum landskassans býttar á málsøkið frá 2005 til 2009.

**Talva 5.7: Nettoløguútreiðslur landskassans, 2005-2009**

| *Mió. kr.* | | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 6,4 | 22,8 | 2,2 | 1,0 | 1,5 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 2,5 | 3,4 | 1,4 | 1,0 | - |
| § 3 | Fíggjarmál | -0,7 | - | 1,0 | 1,5 | - |
| § 5 | Fiski- og tilfeingismál | 0,6 | 9,0 | 12,0 | 4,9 | - |
| § 6 | Vinnumál | 80,8 | 151,0 | 130,0 | 38,3 | 68,9 |
| § 7 | Mentamál | 14,5 | 24,9 | 70,0 | 104,9 | 32,1 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 65,9 | 56,8 | 74,0 | 76,5 | 42,5 |
| § 14 | Løgmál | 30,8 | - | 1,3 | 6,0 | 0,0 |
| § 16 | Uttanríkismál | | | | - | - |
| **Tilsamans** | | **200,8** | **267,7** | **291,8** | **234,1** | **145,0** |

Viðm: Tølini fyri 2008 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2009 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.5 Framskrivingar og bundnar raðfestingar 2009

Talva 5.9 vísir yvirlit yvir framskrivingar í fíggjarlógaruppskotinum 2009 samanborið við fíggjarlógina 2008.

**Talva 5.9: Framskrivingar**

| § | Høvuðskonta | Tekstur | Broyting til FLU-2009 |
|---|---|---|---|
| **3** | 11146 | Søla av partabrøvum í P/F Elektron | 5,0 |
| | 22401 | Stuðul til rentuútreiðslur | 7,0 |
| | 23207 | Læraraeftirlønir | 9,7 |
| | 35105 | FAS-endurgjald | 7,2 |
| **5** | 32103 | Jarðfeingi | -8,3 |
| | 34401 | Inntøkutrygd hjá fiskimonnum | 9,4 |
| **6** | 37204 | Endurgjald til skipasmíð | -7,0 |
| | 37611 | Partabrøv, ymsi viðurskifti | 6,6 |
| | 38219 | Norðoyatunnilin | 10,0 |
| **7** | 23201 | Fólkaskúlin | 11,9[2] |
| | 23305 | Miðnámsútbúgvingar | 4,3 |
| | 23314 | Studningur til læarupláss | 4,0 |
| | 23704 | Lestrarstudningur | 9,6 |
| | 24210 | Norðurlandahúsið | -2,8 |
| **8** | 20304 | Landssjúkrahúsið | 36,1[3] |
| | 20310 | Klaksvíkar sjúkrahús | 3,0[4] |
| | 20315 | Suðuroyar sjúkrahús | 2,1[5] |
| | 20320 | Serviðgerð uttanlands | 4,9 |
| | 21106 | KT-heildarskipan til Almannastovuna | 2,0 |
| | 21301 | Barnavernd | 1,6 |
| | 21601 | Serforsorg | 3,7 |
| | 21604 | Eldrarøkt | 8,4 |
| | 21610 | Ansingarsamsýning | 4,5 |
| | 21701 | Vanlig forsorg | 26,8 |
| | 21801 | Fólkapensjón | 15,5 |
| | 21805 | Fyritíðarpensjón | 18,0 |
| **14** | 38201 | Strandfaraskip landsins | -2,3 |
| **Samanteljing** | | | **190,9** |

[2] Herav stava 7,7 mió. kr. frá 3% í lønarframskriving.
[3] Herav stava 38 mió. kr. frá eykajáttannarumbøn í 2008.
[4] Herav stava 1,6 mió. kr. frá eykajáttanarumbøn í 2008.
[5] Herav stava 1,0 mió. kr. frá eykajáttanarumbøn í 2008.

Talva 5.10 vísir yvirlit yvir bundnar raðfestingar í fíggjarlógaruppskotinum 2009 samanborið við fíggjarlógina 2008.

**Talva 5.10: Bundnar raðfestingar**

| § | Høvuðskonta | Tekstur | Broyting til FLU-2009 |
|---|---|---|---|
| **3** | 21201 | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | 2,5 |
| | 35105 | FAS-endurgjald | 28,0 |
| **5** | 11105 | Fiskimálaráðið | 2,9 |
| | 34304 | Magnus Heinason | 1,5 |
| **6** | 39401 | Barsilsskipan | 6,8 |
| **7** | 23201 | Fólkaskúlin | 5,8 |
| | 23202 | Sernámsdepilin | 5,1 |
| | 23305 | Miðnámsútbúgvingar | 12,4 |
| | 23605 | Vinnuháskúlin | 1,5 |
| | 23613 | Læraraskúlin | 3,6 |
| | 23616 | Fróðskaparsetur Føroya | 5,5 |
| **8** | 20110 | Koppsetingar | 1,9 |
| | 21306 | Barnaískoyti | 6,1 |
| | 21601 | Serforsorg | 2,9 |
| | 21604 | Eldrarøkt | 2,0 |
| | 21611 | Stuðulstænastan | 1,0 |
| | 21805 | Fyritíðarpensjón | 7,9 |
| **14** | 11128 | Løgmálaráðið | 1,7 |
| **16** | 11154 | Uttanríkistænastan | 1,7 |
| **Samanteljing** | | | **100,9** |

## 5.6 Løgur 2009

Talva 5.8 er eitt yvirlit yvir løgurnar í fíggjarlógaruppskotinum 2009.

**Talva 5.8: Løguætlanin fyri 2009** (1.000 kr.)

| | | |
|---|---|---|
| **§ 1** | **Løgtingið** | **1.500** |
| | Løgtingshús | 1.500 |
| **§ 6** | **Vinnumál** | **169.000** |
| | Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni | 6.000 |
| | Tyrlupallur í Kirkju | 2.000 |
| | P/F Vága Floghavn, útbygging | 100.000 |
| | Øravík-Hov | 2.600 |
| | Dagføring av brún og tunnlum | 6.000 |
| | Innkoyringarvegur til Tórshavn | 5.000 |
| | Trygdartiltøk, størri ábøtur og at taka til | 2.000 |
| | Leynartunnilin | 6.300 |
| | Vegagerð í Leirvík | 30.000 |
| | Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunnlar | 2.000 |
| | Kanning av føstum sambandi undir Skopunarfjørð | 2.000 |
| | Botnkanningar av atløguplássi í Svínoy | 500 |
| | Vága Floghavn | 4.600 |
| **§ 7** | **Mentamál** | **32.100** |
| | Skúladepil í Suðuroynni | 1.000 |
| | Fiskivinnuskúlin í Vestmanna | 600 |
| | Skúlin á Trøðni | 1.500 |
| | Studentaskúlin í Hoydølum | 4.000 |
| | Skúladepilin í Marknagili | 20.000 |
| | Kirkjubømúrurin | 1.000 |
| | Nýggj tøkni til Kringvarp Føroya | 4.000 |
| **§ 8** | **Almanna- og heilsumál** | **42.500** |
| | Bústovnar | 26.300 |
| | Eldrasambýlið | 16.200 |
| | **Løgur tilsamans** | **245.100** |
| § 6 | Flyting úr Íleggingargrunninum til Vága Floghavn | 100.000 |
| § 6 | Søla av jørð til kommunur | 100 |
| | **Løguútreiðslur tilsamans íroknað søla av løgum** | **145.000** |

## 5.7 Gongdin í skuld og gjaldføri landskassans

Bruttoskuld landskassans var 3,4 mia. kr. í august 2008. Av hesum vóru 2,2 mia. kr. lánsbrævaskuld og 500 mió. kr. vóru skuld til danska ríkiskassan.[6]

Tað er ásett við lóg, at innlánið hjá landskassanum í Landsbanka Føroya skal vera 15% av BTÚ, landsstýrið hevur heimild at trekkja upp til 70% av minstainnlánin-um. Í august í ár var innlánið 2.118 mió. kr. ella 618 mió. kr. omanfyri minsta-kravið, sí mynd 5.2.

**Mynd 5.2: Gjaldføri landskassans í Landsbanka Føroya**




Kelda: Landsbanki Føroya.

[6] Hesar 500 mió. kr. eru rentu- og avdráttarfríar so leingi eingin olja er funnin í føroysku undirgrundirini. Er eingin olja funnin innan 2018, verða tær avskrivaðar.